KÍF-H71 26-37 (14-20):

# Kollfirðingar niður á jørðina

**Eftir at hava vundið burtur úr meistaraliðnum fyri viku síðani, varð KÍF so dyggiliga sett upp á pláss, tá H71 var mótstøðuliðið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

At tað er skjótt hvønn vegin í ítrótti, eru avrikini hjá KÍF seinastu góðu vikuna gott dømi um.

Fyri viku síðani løgdu teir lunnar undir kappingarárið við einum stríðsavriki, sum var nóg mikið til at senda meistararnar úr Kyndli til hús við stórtapi. Hesaferð vóru hoyvíkingar mótstøðuliðið, og tað var ikki bara sum at siga tað. Longu fyrstu tíggju minuttirnir bóru boð um, at hetta skuldi ikki vera dagurin hjá KÍF, og við støðuni 2-9 valdi Kári Durhuus at rópa sínar menn inn til timeout, hóast bara smáir tíggju minuttir vóru farnir á klokkuni.

Eftir hetta gekst nakað betri, men tó ikki soleiðis, at munurin minkaði nakað serligt. Hoyvíkingar hava styrkt sær væl um liðið í summarsteðginum, og teir megnaðu uttan stórvegis trupulleikar at halda tørn.

Tað gjørdu teir eisini eftir steðgin, og spakuliga noyddust KÍF at ásanna, at her fekst einki burturúr. Seinastu løtuna tóktist eisini, sum høvdu teir givið upp alla vón um at fáa nakað burturúr dystinum, og so kundi H71 í friði og náðum økja um leiðsluna, sum at enda gjørdist heili 11 mál.

### Miðja høgt

Saman við avrikinum móti VÍF seinast er einki at ivast í, at avrikið hesaferð var við til at geva hoyvíkingum trúnna uppá, at tað væl kann gerast eitt stuttligt kappingarár hjá teimum í ár.

Tá Henrik Gerster kom til sum venjari fyri góðum ári síðani vóru boðini, at teir um tvey ár skuldu gerast partur av føroyska hondbóltsoddinum, og nú gott ár seinni er als ikki óvist, at tað málið er so veruleikafjart. Plássið í steypafinaluni í fjør staðfesti eisini, at liðið kann røkka langt á einum góðum degi, og nú ræður um at bera so í bandi, at tað verður styttri millum góðu avrikini.

Hjá KÍF var talan um ordans bakkaláara, eftir at teir høvdu lagt so bragdliga fyri. Nú bendir veruleikin aftur meira tann vegin, at teir mugu stríðast fyri at sleppa undan botninum. Men júst tað at stríðast er ein av fremstu eginleikunum hjá liðnum, og tað skuldi verið ógvuliga løgið, um teir bara tveita handklæðið í ringin soleiðis uttan víðari.

**FAKTA um dystin**

**KÍF-H71 26-37 (14-20)**
Málskjúttar
KÍF: Gert Hansen 4, Rógvi Weihe 4, Regin Petersen 4, Eddie Joensen 4, Mirko Milenkvic 2, Kristian Madsen 2, Jóan Pauli Olsen 2(1), Teitur Joensen 2, Petur Martin Poulsen 1, Sune Davidsen 1
H71: Halgir Dahl Olesen 8, Piti Negru 7, Niels Viggo Niclassen 7(4), Henrik Gerster 5, Birgir Kass 4, Christian Eli Zachariassen 3, Høgni M. Joensen 2, Olaf Vestergaard 1
Brotskøst: KÍF 2, H71 4
Útvísingar: KÍF 2, H71 3
Dómarar: Hartvig Joensen & Pole Hansen

Neistin-Kyndil 28-19 (12-9):

# Tølini siga ikki alt

**Neistin vann ein uppibornan sigur á Kyndli, men sigurin var ikki heilt so vísur, sum tølini siga**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóast tær stríddust, so fekk Kyndil einki burtur úr grannauppgerðini, men fyrstu stigini eru helst ikki heilt so langt burturi, sum mong annars hava hildið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var neyvan nakað annað í væntu, enn at Neistin skuldi vinna ein tryggan sigur á Kyndli sunnudagin. Hóast tað eru nøkur ár síðani seinasta meistaraheitið, so plagar Neistin at spæla við um heiðursmerkini, samstundis sum Kyndil hevur havt ein stóran niðurtúr á kvinnusíðuni seinnu árini.

Eitt skifti ljóðaði enntá, at Kyndil fór at taka liðið úr kappingini, men so galið tykist tað nú als ikki at vera.

### Bitu frá sær

Kyndil gav enntá Neistanum ein lítlan hvøkk fyrstu løtuna av dystinum. Á liðnum í ár eru onkrar av teimum, sum áður hava tikið nógv tøk fyri felagið, og nú gjørdu Anja Midjord, Súsanna Hansen og Lotte Sørensen sítt til, at talan ikki gjørdist um nakran walk-over hjá Neistanum.

Okkurt skifti var Kyndil enntá á odda, men móti endanum av fyrra hálvleiki eydnaðist tó Neistanum at toga seg framum.

Og tó at Kyndil í seinna hálvleiki royndi at toga seg framat Neistanum, so eydnaðist hetta ongantíð heilt. Eitt skifti varð munurin minkaður í fýra mál, men so tók Neistin dik á seg seinastu 10 minuttirnar, soleiðis at talan samanlagt gjørdist um ein tryggan sigur.

### Kyndil kann kanska

Neistin vísti tað so ikki í hesum dystinum, men tað tykist sanníkt, at tær væl kunnu fara at leggja seg út í heiðursmerkjastríðið aftur í ár. Sum vant, so verður aftur í ár roynt at seta nýggjar leikarar við, men hartil hevur liðið í ár eisini nakrar leikarar, ið veruliga hava royndir, so tað munar. Eitt nú var Inga Dahl aftur at síggja á vøllinum, eins og Kára á Dunga og Helena Dam Poulsen hava sín stóra týdning fyri liðið.

Tað sama hevur Ása Dam á Neystabø skjótt eisini fingið, og lærir hon at stýra sínum ídni eitt lítið sindur betri, kann hon gerast ein av teimum heilt spennandi leikarunum í landinum.

Hjá Kyndli verður talan helst ikki um heiðursmerki í ár, men tað verður nokk heldur ikki um sama leiklut niðast á botninum, sum tað annars hevur verið lagt upp til.

Við Guðrun á Lágabø hevur liðið fingið ein kompetentan avloysara í málinum, og megna tær royndu at toga spælið hjá minni royndu eitt sindur upp, so skal tað als ikki koma óvart á nakran, um tær grønu megna at spæla seg til eitt ella tvey óvæntað úrslit í ár.

**FAKTA um dystin**

**Neistin-Kyndil 28-19 (12-9)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Simona Petersen 10(2), Lív Sørensen 5, Ása Dam á Neystabø 5, Annika Thomsen 3, Marjun Tróndarson 3, Lív Reynheim 2
**Kyndil:** Randi S. Wardum 7, Lotte Sørensen 5(2), Linda Weihe 4(1), Súsanna Petersen 2, Súsanna K. Hansen 1
**Brotskøst:** Neistin 5, Kyndil 7
**Útvísingar:** Neistin 3
**Dómarar:** Karstin Joensen & Kristian Joensen. Høvdu ikki stórvegis av trupulleikar av at stýra ferðfátæka dystinum.

StÍF-Tjaldur 31-25 (13-10):

# Tjaldur í botni

**StÍF var greitt omaná, tá Tjaldur vitjaði sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tvey av liðunum, sum á pappírinum tykjast vera í veikara endanum av kvinnudeildini hittust á Skála sunnudan, tá Tjaldur vitjaði StÍF.

Fyrsta umfarið høvdu tey bæði verið fyri greiðum tapi, og hjá Tjaldri gjørdist talan í so máta um eina endurtøku sunnudagin.

Heilt so greitt, sum tað var móti Stjørnuni, gjørdist tapið tó ikki, men tað var sjáldan ivi um, at StÍF var sterkara liðið.

Fyrsta korterið ella har á leið var tað tó Tjaldur, sum hevði leiðsluna, men so skjótt strandakvinnurnar fóru at máa av hesari tóktist greitt, hvønn vegin tað fór at bera.

Og eftir steðgin settu tær á heimaliðnum so alt upp á pláss. Seks mál á rað í átta minuttir beindu allan sum helst iva til viks, og so kundi tað gera tað sama, at Tjaldur royndi at pynta eitt sindur um seinastu 20 minuttirnar. Stigini fóru í øllum førum ikki nakran veg.

### Líta frameftir

Tað eru bara tvey ár síðani, at StÍF vann bronsuna í kvinnudeildini, men hóast hetta, so tykjast heiðursmerki ikki at vera tað, sum tey tosa um í løtuni.

Við Burcea Abela í málinum sum einasta útlendingi er málið heldur at byggja eitt nýtt lið upp, og einki er at ivast í, at tilfarið í ein stóran mun er til staðar. Ikki minst tykist Rebekka – við tí so væl kenda eftirnavninum, Justinussen – at vera ein leikari, sum kann gera nógv um seg komandi tíðina, men eisini aðrar á liðnum hava áður prógvað, at tær væl kunnu standa seg.

Hjá Tjaldrinum tykist talan hinvegin ikki at skula gerast um nógv annað, enn eitt stríð fyri at sleppa undan botnplássinum. Spakuliga eru nøkur nýggj nøvn tó í ferð við at troka seg inn á liðið, og fáa hesar tíð at mennast, so kann eisini væl vera, at Tjaldur í framtíðini fer at hava eitt orð at siga í føroyskum kvinnuhondbólti.

**FAKTA um dystin**

**StÍF-Tjaldur 31-25 (13-10)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 7, Poula Olsen 7, Sunfríð B. Jacobsen 6, Anna B. Danielsen 4, Paula Høgnesen 4(2), Malan Petersen 3
**Tjaldur:** Vesna Tomajek 8(1), Kristine Ellingsgaard 6, Mona Langgaard 4, Hansa Mikkelsen 2, Kirstin Jacobsen 2, Heidi Heinesen 2, Julianna Rasmussen 1
**Brotskøst:** StÍF 3, tjaldur 1
**Útvísingar:** StÍF 4, Tjaldur 6
**Dómarar:** Hannis Wardum & Uni Wardum.



# Heðin aftur til Klaksvíkar

**KÍ formaðurin fegnast um, at Heðin aftur fer at spæla í barndómsfelagnum, og hann undirstrikar samstundis, at Atli Danielsen eisini verður í Klaksvík næsta ár**

KÍ FYRIREIKING
*Jóannes Hansen*



*Eg havi havt nøkur sera góð ár í høvuðsstaðnum, og nú gleði eg meg til aftur at spæla við KÍ, sigur Heðin á Lakjuni, sum nú aftur vendir heim til Klaksvíkar*

Heðin á Lakjuni fer næsta ár aftur at spæla við barndómsfelagnum. Á móttøkuni, sum HB skipaði fyri í Norðurlandahúsinum sunnudagin, varð boðað frá, at klaksvíkingurin ikki verður í HB næsta ár. HB takkaði honum fyri árið og góða íkastið, sum hann hevur verið til stóru sigrarnar, og samstundis ynsktu teir honum góða eydnu.

Tað hevur ljóðað eina tíð, at Heðin aftur skuldi til Klaksvíkar, og tað váttar Heðin á Lakjuni, at hann skal:

– Vit flyta norður aftur at búgva. Eg havi havt nøkur sera góð ár í høvuðsstaðnum, og nú gleði eg meg til aftur at spæla við KÍ. Eg veit ikki, hvussu nógvan styrk felagið fer at fáa, men mín fatan er, at teir arbeiða miðvíst við hesum, so tað sær spennandi út.

Heðin á Lakjuni hevur spælt fótbólt í havnarfeløgunum í trý ár, og úrtøkan hevur verið framúr stór. Í 2001 vann hann FM og steypakappingina við B36. Í 2003 vann hann steypakappingina og silvur í landskappingini við B36, og í ár hevur hann vunnið bæði FM og landskappingina við HB.

### Atli verður í Klaksvík

Gestur Hovgaard, formaður í KÍ, fegnast sjálvandi um, at Heðin á Lakjuni aftur er komin til Klaksvíkar, har hann eisini var í 2002.

– Heðin hevur ikki minst í ár víst, at hann er ein góður spælari. Í síðstu viku var hann aftur á landsliðnum, og tað var ikki annað enn rímuligt, at hann aftur fekk tann møguleikan, tí hann hevur verið stinnur á HB liðnum.

Gestur Hovgaard undirstrikar staðiliga, at Atli Danielsen fer ongan veg.

– Áhugin fyri fótbólti her norðuri er rættuliga stórur. Eg verði aftur og aftur biðin um viðmerkingar til tíðindi um, at Atli skal flyta til Havnar at spæla. Eg kann bara staðfesta, at vit hava sáttmála við Atla næsta ár, og harvið verður tað.

*Hvussu verður tað við venjaranum?*

– Vit gjørdu trý ára sáttmála við Ove Flindt-Bjerg í fjør. Møguleiki var hjá báðum pørtum at siga sáttmálan upp, tá ið hetta árið var farið, men tað hevur hvørgin parturin gjørt. Ove Flindt-Bjerg verður tískil venjari hjá okkum næsta ár, sigur Gestur Hovgaard.

KÍ formaðurin vil ikki gera viðmerkingar til søgur, sum hoyrast um aðrar spælarar, ið skulu vera á veg til Klaksvíkar.

Tað hevur annars ljóðað, at Rúni Elttør, sum í ár hevur spælt við ÍF og í fjør var í B36, aftur skal spæla við KÍ, og at Hjalgrím Elttør eisini skuldi flyta úr Fremad Amager og til barndómsfelagið. Í síðstu viku visti Dimmalætting at siga, at Hjalgrím hevur fingið tilboð frá Fremad Amager um nýggjan sáttmála. Sáttmálaskeiðið hjá Hjalgrími í Fremad Amager verður liðugt á nýggjárinum.

StÍF-VÍF 21-23 (9-8):

# Aftur tepurt hjá VÍF

**Eftir tveir dystir hava vestmenningar fult stigatal, men málmunurin er bert trý rætta vegin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at strandingar í nógv ár hava myndað avgjørda oddin í føroyskum manshondbólti, tykjast teir í ár at hava mist tann allar seinasta broddin, sum teir annars hava havt.

Einki er at ivast í, at StÍF hevur kanska besta hópin, tá um ræður føroyskar hondbóltsleikarar, men nú teir royna seg uttan útlendskan styrk yvirhøvur kann roknast við, at teir í avgerandi dystunum koma at vanta seinasta broddin, sum kann koppa dystunum rætta vegin.

Tað var tó um reppið, at teir kortini megnaðu at basa arvafíggindanum úr VÍF, sum hinvegin heldur ikki hevur tann heilt stóra útlendska styrkin. Soleiðis eru tað í ár bara Daniel Rápa og Dejan Lacock, sum ikki er partur av Vestmanna-partinum av VÍF-liðnum.

### Misnýtt brotskøst

Talan var alla tíðina um ein tættan dyst inni á Skála sunnudagin. Eitt skifti fyri steðgin vann StÍF sær eina trý mála stóra leiðslu, men hendan var undan steðginum minkað í at kalla einki, og eftir steðgin fóru vestmenningarnir so avstað. Ikki minst takkað verið málverjaspælinum, sum aftur hesa ferð vísti seg í serflokki, tá talan er um brotskøst.

Hetta er ein eginleiki, sum VÍF-málverjarnir hava havt seinastu nógvu árini, og einki tykist at broytast í so máta í ár. Strandingar høvdu í dystinum fýra brotskøst, sum øll vórðu misnýtt, og saman við dystinum móti H71 seinast siga hagtølini hjá VÍF, at teir hava fingið 11 brotskøst dømd ímóti sær, men at bert eitt av hesum er farið inn. Tá tað so verður lagt afturat, at VÍF hevur vunnið hesar dystir við tilsamans trimum málum, so er einki at siga til, um Eli Müller og Dejan Lacock í hesum døgum ganga eitt sindur erpandi kring bygdina.

Og sum dysturin leið, so bendi alt á, at talan skuldi gerast um ein heilt tryggan sigur hjá VÍF. Okkurt skifti var leiðslan fýra mál, men móti endanum fór aftur at tátta í. Tríggjar minuttir fyri leiklok var munurin bert eitt mál, men so gekk ikki longur, og við tveimum málum frá unga Karl Johan Durhuus kundi VÍF staðfesta sigurin.

### Bíða eftir Kyndli

Og hesin ber við sær, at VÍF eftir tveimum umførum er einasta liðið, sum hevur fult stigatal í deildini. Tað hava teir helst eisini eftir dystirnar næsta vikuskifti, tá KÍF kemur á vitjan, men so verður talan um dyst móti Kyndli, og tá er einki at ivast í, at spenningurin fer at vera væl størri.

Hjá strandingum sær nokk ikki so svart út, hóast teir ikki hava útlendska styrkin við í ár. Felagið hevur seinnu árini uppalt hópin av framúr hondbóltsleikarum. Aftur í ár síggjast eisini nýggj nøvn treingjast upp á dómaraseðilin, og so er spurningurin bara, hvørt hesi eisini eiga seinasta kryddið, ella um tað verður neyðugt at leita uttanlands eftir hesum.

**FAKTA UM DYSTIN**

**StÍF-VÍF 21-23 (9-8)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Leivur Justinussen 4, Bárður Danielsen 4, Artur Johansen 4, Sveinur Justinussen 4, Bent Djurhuus 3, Pauli G. Hansen 2
**VÍF:** Agnar Joensen 8(2), Ingi Olsen 5, Karl Johan Durhuus 4, Jákup S. Andreasen 3, Harald Bjørgvin 1, Petur Frank Joensen 1
**Brotskøst:** StÍF 4, VÍF 3
**Útvísingar:** StÍF 3, VÍF 2
**Dómarar:** Hannis Wardum & Uni Wardum.